# Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Hósdagur
7. oktober 1999
Nr. 189
122. árgangur

Kr. 10,00


## Temablaðið er hesaferð um bilar

Rættilig gongd kom á aftur bilasoluna fyri nøkrum árum síðan, og bilparkin bara yngist. Í blaðnum í dag hava vit fleiri greinir um nýggjar bilar, útgerð og annað spennandi fyri tann biláhugaða. Vit hava eisini royndarkoyrt ein bil

Eykablað



## Almenni leikluturin tódnar

Búskaparvøksturin seinastu árini hevur verið nógv størri enn útreiðsluvøkstur landskassans. Hetta merkir millum annað, at landskassin er vorðin ein lutfalsliga minni partur av heildarbúskapinum

Heimatíðindi 5



## Afturval til BJP flokkin í India

Tað verður helst sami flokkur, ið verður leiðandi stjórnarflokkur í India komandi valskeið, tí at fyrstu uppteljingarnar geva BJP flokkinum ein tepran meiriluta

Uttanlandstíðindi 8





Útsynningur, 8-13 m/s. Skyggjað og ælaveður. Hitin 5-8 stig.

# Løgtingið verður tvingað at taka støðu til umboðsmann

– Tingmenn skulu tvingast til at taka støðu, sigur Jenis av Rana løgtingsmaður, sum fyrsta dagin fer at leggja fram fullfíggjað lógaruppskot at seta ein løgtingsins umboðsmann á stovn

INGI RASMUSSEN

– Eg skilji ikki, hví Føroyar sum tað einasta landið um okkara leiðir ikki skal hava ein løgtingsins umboðsmann.

Løgtingsmaður Miðfloksins Jenis av Rana er vónsvikin av, at eingin løgtingsins umboðsmaður verður á hesum sinni heldur.

Formansskapurin hjá løgtinginum hevur nevniliga gjørt av, at nógv umrøddi løgtingsins umboðsmaður skal strikast av fíggjarlógini.

Seinastu árini hava annars verið settar 600.000 krónur av á fíggjarlógini til at fáa ein umboðsmansstovn at virka. Men tað er ongantíð komið so langt, hóast løgtingið í 1993 samtykti at áleggja formansskapi løgtingsins »at seta eitt fólk við góðum kunnleika til samfelags-, stats-, og fólkarætt til at samskipa neyðugt lógartilfar fyri ein løgtingsins umboðsmann og at stovnseta starvið í hesum ári.«

### Styrkt nevnd

Formansskapurin hevur í staðin gjørt av at styrkja landsstýrismálanevndina. Landsstýrismálanevndin hevur eftir stýrisskipanarlógini eftirlit við, at landsstýrið fremur arbeiði sítt á lógligan hátt. Sambært viðmerkingunum til lógina kann nevndin sammetast við ein umboðsmansstovn.

Ætlanin er at styrkja arbeiðið hjá nevndini soleiðis, at hon fær betri møguleikar bæði at viðgera kærur og at taka mál upp av egnum ávum. Hetta verður gjørt við, at nevndin fær meira skrivarahjálp, og harumframt kann søkja sær sakkøna hjálp uttanífrá. 1,3 milliónir krónur verða komandi ár settar av til landsstýrismálanevndina eftir uppskotinum.

Samstundis verður sagt í uppskotinum, at landsstýrismálanevndin skal virka sum eitt slag av umboðsmanni, í fyrsta lagi í eini tvey ár, og tá er ætlanin at taka málið uppaftur um eina møguliga lóg um umboðsmannin.

Men løgtingið sleppur fyrr enn tað at taka støðu til, hvørt ein umboðsmaður skal setast á stovn. Jenis av Rana arbeiðir nevniliga við at gera eitt fullfíggjað lógaruppskot um ein umboðsmann at leggja fyri løgtingið.

### Borðið fangar

– Tað er øgiliga týdningarmikið, at málið verður lagt fram sum lógaruppskot, so løgtingsfólk sleppa at trýsta á knøttarnar, sigur Jenis av Rana.

Hann kundi í staðin bara lagt eitt uppskot fram til samtyktar at heita á landsstýrið um at fara undir arbeiðið. Soleiðis sum gjørt var í 1994.

– Tað liggja upp í rúgvur av slíkum uppskotum í landsstýrinum, sum ongantíð um.

vera av nøkrum. Um løgtingsmenn atkvøða fyri einum lógaruppskoti, so fangar borðið, tí lóg er lóg. Svara tingmenn hinvegin noktandi, so fáa teir høvi at greiða veljaranum frá, hví vit ikki skulu hava eftirlitsstovnin, sigur Jenis av Rana.

Hvussu víkir og vendir, so fær landsstýrismálanevndin ongantíð verið eins óheft og saklig og ein umboðsmaður, heldur tingmaður Miðfloksins.

– Formansskapurin kann ikki krógva seg undir, at landsstýrismálanevndin er tað sama sum ein umboðsmansstovnur. Fyri tað fyrsta verður nevndin altíð politiskt litað, tí hon er mannað við politikarum. Harafturat kemur, at politikarar ikki hava neyðuga førleikan, sum skal til fyri at taka støðu í slíkum viðbreknum málum, sigur Jenis av Rana.

Miðflokkurin leggur uppskotið fram innan tvær vikur eru gingnar, væntar Jenis av Rana.



## Ungur nemur gamal fremur

Føroyskur ungdómur er við í einari størri verkætlan millum samfelagsgranskarar í Norðurhøvum.

Ungfólk í Klaksvík og Vági eru biðin um at svara spurningum um, hvussu tað er at búgva á »smærri plássum«. Framtíðin hjá smáplássum í Norði er evnið fyri granskingarverkætlanini.

Lesið á síðu 5

## Statoil gevst í Russlandi

Almenna norska oljufelagið Statoil gevst fyribils við oljuleiting og øðrum virksemi í Russlandi. Orsøkin er tann, at Statoil ikki heldur, at arbeiðsumstøðurnar eru nóg góðar

– Fyri nøkrum døgum síðani søgdu vit við russiska samstarvsfelaga okkara, at vit fyribils steðga øllum virksemi okkara í Russlandi. Um vit einaferð í framtíðini skulu taka upp aftur hetta virksemi, mugu umstøðurnar innan oljuvinnuna í Russlandi broytast rættilga nógv, sigur Statoil stjórin Bård Johansen.

Statoil byrjaði oljuleiting í Russlandi í 1990. Orsøkin til, at norska felagið fór til Russlands, var tann, at ótrúliga stórar mongdir av olju finnast í russisku undirgrundini, men tað er lættari sagt enn gjørt at útvinna hesa olju. Skuffuveldi ella beuraukrati í Russlandi ger, at arbeiðsgongdin gerst alt ov tung.

Johansen sigur bart út, at vinnufólk ikki halda Russland vera so áhugavert land at seta pengar sínar í longur.

Fyri 10 árum síðani lovaðu russisku myndugleikarnir, at stórar broytingar fóru at henda á vinnuøkinum, men sambært Johansen er einki hent.

Sæð við føroyskum eygum, er tað ikki tað ringasta, sum kann henda, um altjóða oljufeløg missa áhugan fyri russisku oljuni, tí so fara tey óivað at skeita eitt sindur meiri hendanvegin.

L.L.

## Radio Sirkus

Tað er ikki sørt, at tað er lív í við Hoyvíksvegin, har fyrrverandi starvsfólk á Atlantic Radio hava kringsett bygningin

GEORG L. PETERSEN

Løgreglan vitjaði Atlantic Radio fimm ferðir gjáranáttina. Nakrar ferðir vóru tað eigararnir sum boðsendu løgregluni, nakrar ferðir starvsfólkini.

Og tað eru ikki bara tey við tilknýti til støðina, sum halda lív í kjakinum. Eisini fólk uttanífrá koma framvið, m.a. tveir unglingar, ið krógvaðu seg á eini balkong.

Tá teir báðir ungu menninir fingu boð um koma niður, klintraðu teir enn longur upp, og endaðu á takinum, har teir hvørki sluppu aftur ella fram. Hesir báðir komu ikki niður aftur, fyrr enn løgreglan kom á staðið og bað teir koma niður.

Lesið á síðu 5




Vit prenta



b
l
ø
ð
o.a.

Skjótt og væl

Dimmalætting
Tlf. 31 12 12 • Fax 31 76 81
e-mail:accidens@dimma.fo




Lesið tíðindi á Interneti
– dag sum nátt –
HVØNN DAG

Hevur tú ikki fingið blaðið?

Vit gera alt, hvat vit kunnu, fyri at haldarar okkara fáa leygardagsblaðið til tíðina. Men villur kunnu koma fyri, og um tú ikki hevur fingið blaðið til tíðina, ring so 214118, so vit kunnu syrgja fyri, at tú fært blaðið.

Dimmalætting

Náttúrudeildin
PATRÓNIR




Stórt úrval av fugla- og harupatrónum frá ELEY fáast um alt landið

Heimskendar fyri sína høgu góðsku síðan 1828

P/F THOMAS DAM
Á HÁLSI
Tlf. 311400 - Fax 315574

Atlantic Airways
MAERSK AIR
ICELANDAIR
SAS

Faroe Travel
Tlf. 31 26 00